Til ber at melda seg sum lim í Oljutinginum, á Jólatinginum ella í Vinnuhúsinum.

JÓLATING 2000

Vit bjó›a til Jólating 13. desember á Hotel Føroyum kl. 18.00. Umframt kulinariskar delikatessur, bor›rei›a vit vi› kveikjandi huglei›ingum.

Johan Poulsen fer at siga frá lívi og arbei›i sínum á einum bor›ipalli, **Ben Arabo** tosar um oljuvinnuna sum vinnuveg, og **Ey›un Andreassen** huglei›ir um, hvussu vit føroyingar samskifta.

Vinarliga melda til í Vinnuhúsinum á telefon 311864 - ella um teldupost: industry@industry.fo í seinasta lagi 8. desember.

Vælkomin

Vinarliga

Oljutingi›

OLJUTINGIÐ

JÓLAKORT

Kom inn og fá tikið eina fitta mynd í hugnaligum jólaumhvørvi

10 jólakort v/brævbjálva
Fotografering íroknað.................... 119,-

Fylgjandi jólakort, kr. 9,- fyri hvørt

Eftir egnum negativi
10 jólakort v/brævbjálva........................ 89,-

Fotodeildin, tel 35 35 34
SMS · Tel 35 35 35 · Fax 35 35 36
E-mail: tryarin@post.olivant.fo

3arin

NÚ ER BAMSAN KLÁR TIL JÓLA

Vit hava fingið Pokémon blusurnar aftur

Vit hava eisini tær vælumtóktu beavernylon draktirnar

Støkk inn á góvið!

BAMSAN
v/ Charlotte Ellendersen
N. Finsensgøta 25 • 100 Tórshavn
Tel. 32 11 11

Sosialurin - 311820

Vilt tú eiga hesi húsini

-so kom og heinta tey!

Uppboðssøla verður leygardagin 9. des. kl 14.00

Vit skulu byggja av nýggjum, og hava tískil ikki brúk fyri hesum húsunum longur. Tí bjóða vit tær at taka tey av grundini og fara avstað við teimum fyri ein bíligan penga.

Húsini eru bygd undir krígnum sum sethús, men hava seinastu árini verið brúkt til skrivstovu. Alt fast innbúgv so sum wc, hurðar, oljufýr, trappur, ljósarmatur og skáp fylgir við í keypinum.

Húsini standa á Tinghúsvegi 47, við SMS, yvir av Sparikassanum og eru 55 m^2, (8,80 x 6,30 m)

Komandi leygardag 9. desember kl. 14.00 verður uppboðssøla á staðnum. Tú kanst síggja húsini týsdagin 5. desember frá kl. 17.00 til 19.00 ella frá kl.10.00 sama dag sum uppboðssølan er. Prísuppskot 100.000 krónur. Boðið byrjar við 1,00 krónu. Váttan fyri fíggingini krevst. Bjørn á Heygum stendur fyri uppboðssøluni.

Einasta treyt vit seta er, at grundin verður ruddað og grundøkið væl frágingið innan 14. januar 2001.

Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Sansir á tel 355 355, spyr eftir Høgna ella Boga.

SANSIR

Sansir pf, Tinghúsvegur 47, Box 1099, FO-110 Tórshavn, Tel 355 355, Fax 355 350, sansir@sansir.fo, www.sansir.fo

Vikuskifti

Nr. 233 • leygardagur • 2. desember 2000 • 74. árgangur • www.sosialurin.fo

Creamy:
Stjørnur í advent
sí›a 20-21

HIMNOS DEL CIELO. Fyri fyrstu fer› er ein jólafløga spæld inn á Kuba. Hóast teksturin er spanskur, eru útgevararnir nor›menn

Noel Fidel

Katia Cardenal í Havanna. Mynd: Alberto Korda

Birgir Kruse

”Kom heim til mín á jólum” ella á spanskum ”Ven a mi casa esta navidad”. Solei›is rópast fyrsta jólafløga, sum gjørd er á Kuba. Ta› er Katja Cardenal, sum syngur spansku jólasangirnar, sum festir vór›u á band í Studio Abdala í hitanum í kubanska høvu›sta›num Havanna í summar.

Katja er ætta› úr Nikaragua, men b‡r í Noregi. Har hevur hon fingi› plátufelagi› Kirkelig Kulturverksted áhuga› í ætlanini, sum Erik Hillestad hevur skipa› fyri. Nú er fløgan vi› spansku jólasangunum í sølubú›unum.

Norska plátufelagi› Kirkelig Kulturverksted hoyrir til bókaforlagi› Aschehough og hevur í mong ár gjørt vart vi› seg innan n‡skapandi tónleikaupptøkur. Millum anna› hevur felagi› skipa› fyri upptøkum í Voskresenije kirkjuni í Moskva í oktober 1993 vi› einum einføldum datbandupptakara, har nor›menn og russar møtast í stórbarum ljóma. Og skrúvar ein hart frá, hoyrast herna›arvagnarnir, sum snurra í gøtunum. Ein bæ›i skakandi og hugvekjandi løta me›an Fa›irvár ver›ur frambori› á russiskum og givi› út í Noregi.

Norska plátufelagi› hevur eisini veri› í Su›urafrika, New Orleans og Andesfjøllum, at føra saman norskar sangarar og tónleikarar vi› tí fremmanda og oftani eksotiska. At politikkur, mentapolitikkur, hongur uppi vi› er sjálvsagt. Einki er vandafullari enn tónleikur, i› hevur eina meining. Ta› minti Mikael Wiehe okkum á í Nor›urlandahúsinum t‡skvøldi›.

Sama norska plátufelag hevur eisini megna› at flyta skaldskap hjá so stórum nøvnum sum Bob Dylan, Leonard Cohen, Hank Williams og Kris Kristofferson í norskan búna› og geva tilfari› út á fløgu til almenningin at njóta.

Fyri stuttum skipa› Kirkelig Kulturverksted fyri, at norski urguleikarin Iver Kleive og danski vísusangarin Povl Dissing møttust í Odense dómkirkju. Á skránni stó› Grundtvig og burturúr spurdist forvitnisliga fløgan ”Den Signede Dag”, har eisini gittarleikarin Knut Reiersrud er vi›.

Fyrr í ár, ta› var á ólavsøku, gava sama plátufelag út verki› ”Rex Olavus”, har Ólavur Halgi ver›ur hei›ra›ur vi› gregorianskum kirkjusangi í Ni›arós dómkirkju. Eitt rætt túsund ára hald.

Aktuella jólafløgan vi› Katju Cardenal er hin fyrsta loyvda upptøkan vi› jólatónleiki av oynni Kuba. Ha›ani hevur til denna dag ikki hoyrst jólasangur í advent. Jólahald og alt, i› har hoyrir til, hevur veri› banna› í fleiri ára tíggju. So sigur Fidel.

Fyri kubansku tónleikararnar hevur henda summarsliga upplIving vi› kalligum nor›búgvum tískil veri› naka› heilt serligt. Teir hava hepnast at tónseta fyrstu kubansku jólafløguna. Serliga stóran t‡dning hevur kubanski gittarleikarin Rey Guerra havt. Ey›kendi su›urlendski gittarleikur hansara merkir t‡›uliga fløguna og fær okkum at hugsa um heitaru londini. Afturvi› jólabo›skapinum. Ein bo›skapur, sum á okkara lei›um helst hevur veri› grei›astur í atger›ini hjá Solvognen í Magasin du Nord í Keypmannahavn fyri fjór›ings øld sí›ani.

Og so er ta› myndama›urin, aftanfyri sangarinnuni á kubansku jólafløguni. Mín sann um ta› ikki er Alberto Corda. Hyggja vit at tiltiknu plakatini hjá Torbirni í mentamálast‡rinum, so síggja vit, at hetta er ma›urin aftanfyri kendu Che Guevara myndina. Jú, hann er frammi enn, Alberto Corda. Katju Cardenal hevur hann avmynda› framm fyri Kristusmyndina vi› innsiglingina til Havanna.

Úrvali› av sangum á hesi søguligu kubansku útgávu fevnir ví›a. Her eru teir vanligu jólasangirnir sum ”Gle›ilig jól” og ”Føgur er foldin”. Og eisini ”Mary’s Boychild” og ”Eg gle›ist so hvørt jólakvøld”. Men í egnari spanskari t‡›ing. Katja Cardenal hevur sjálv umsett. ”Noche de Paz” og ”Bella es la Terra”. Og norski jólasangurin hjá Marie Wexelsen frá 1859 og sum Jákup Dahl t‡ddi í 1931 ”Eg gle›ist so hvørt jólakvøld” eitir á spanskum ”Soy tan feliz cada Navidad”. Vi› sálmabókini og tektsheftinum í hesi forvitnisligu útgávu í hendi, kunnu vit læra eitt vet av spanskum í advent. Millum anna› at ”ljó›i› av himni” á spanskum eitir ”himnos del cielo”. Og tittulsangurin á aktuellu jólafløguni er ”Ven a mi casa esta Navidad”, sum á føroyskum kundi ljó›a› ”Kom heim til mín á jólum”. Og ta› er serliga í hesum sangi, at ein merkir ljósa og lætta kubanska stevi› og huglagi›, i› helst man liggja tættari at sannari fest og veitslu, i› hoyrir jólunum til, enn okkara mangan døkku og tungu sálmum og sangum.